Stjørnan-StÍF 26-19 (13-9):

# Stjørnan heldur fast

**Enn hevur Stjørnan ikki mist møguleikan fyri silvurinum. Sunnudagin vunnu tær heimadystin á StÍF, sum á seinasta leikdegi kann rætta Stjørnuni eina hjálpandi hond**

HONDBÓLTUR-KVINNUR
*Jákup Mørk*

At siga at endaspælið í hondbóltskappingini hevur verið serliga gleðiligt fyri Klaksvíkina, er helst at taka munnin ov fullan. Eftir at tær í grundspælinum tóktust vera 100% vísar í silvurmerkjunum, er støðan nógv broytt síðani. Somikið nógv, at liðið kann standa uttan fyri heiðursmerkjarøðina, tá endaspælið er av.

Enn hava tær tó møguleika at ogna sær silvurmerkini, og tær syrgdu í øllum førum fyri, at tær ikki standa veikari enn tær gjørdu, nú farast skal undir seinasta umfarið.

## Eingin ivi

Tað var sum so eingin sum helst ivi, tá StÍF kom á vitjan sunndagin. Ofta hava strandakvinnurnar annars arga Stjørnuna, men hesa ferð skuldi tað so ikki verða.

Eftir fyrsta korterið var støðan 9-2t il heimaliðið, og so var alt í roynd og veru avgjørt. StÍF slapp kanska at nærkast nakað, men Stjørnan hevði fyri tað mesta fult tamarhald á, og nærri enn einum trimumfýra málum komu gestirnir ongantíð.

## Vónin livur

Hóast tær soleiðis vóru ógvuliga sannførandi hesaferð, so skerst ikki burtur, at Stjørnan hevur eina sera trupla uppgávu, nú tær skulu royna at tryggja sær heiðursmerki.

Á seinasta leikdegi vitja tær í Vági, og verður talan ikki um í øllum førum eitt stig í hesum dysti, so fer VB fram um Stjørnuna, og nú vágbingarnir sum tær einastu hava bast VÍF, tykist hendan uppgávan at verða alt annað enn løtt hjá Stjørnuni.

Hóast hetta, so livur vónin um silvurmerkini tó framvegis, og er tað júst StÍF, sum kann geva eina hjálpandi hond í hesum. Meðan Stjørnan vitjar í Vági, tekur StÍF á heimavølli móti Neistanum, og kunnul tær órógva eitt sindur her, samstundis sum Stjørnan vinnur í Klaksvík, so er Stjørnan á øðrum plássi.

Soleiðis er enn einki avgjørt í stríðnum um silvur og bronsu, men fyrst og fremst skal Stjørnan tá hugsa um egna avrikið, og so kunnu tær ringja norður á Skála, tá dysturin í Vági er liðugt leiktur.



*Stjørnan gjørdi skjótt av, tá StÍF vitjaði sunnudagin, og longu eftir fyrsta korterið var dysturin at kalla avgjørdur*

**Dysturin í tølum**
**Stjørnan-StÍF 26-19 (13-9)**
Málskjúttar:
Stjørnan: Sikona Dziugyte 7, Anna Kristina Samson 7, Joan M. Joensen 6(2), Bára Skaale 2, Andrijana Milodanovic 2, Ragna Andreasen 1, Una Olsen 1
StÍF: Alina Olaru 6, Ileana Manulescu 5(1), Anna B. Danielsen 4, Poula D. Olsen 3, Guðrun Ólavsdóttir 1
Brotskøst: Stjørnan 3, StÍF 5
Útvísingar: Stjørnan 3
Dómarar úr VÍF: Daniel Rápa & Piti Negru

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 10- 0 - 1 | 663 | 419 | 244 | 32 |
| 2 | Neistin | 11 | 7 - 1 - 3 | 528 | 452 | 76 | 23 |
| 3 | Stjørnan | 11 | 6 - 1 - 4 | 559 | 480 | 79 | 22 |
| 4 | VB | 11 | 7 - 1 - 3 | 544 | 545 | -1 | 21 |
| 5 | StÍF | 11 | 4 - 0 - 7 | 449 | 542 | -93 | 9 |
| 6 | Kyndil | 11 | 2 - 1 - 8 | 519 | 599 | -80 | 8 |
| 7 | Sóljan | 12 | 1 - 0 -11 | 444 | 669 | -225 | 5 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 9 - 0 - 2 | 694 | 588 | 106 | 29 |
| 2 | Neistin | 11 | 9 - 0 - 2 | 724 | 608 | 116 | 28 |
| 3 | StÍF | 11 | 9 - 0 - 2 | 649 | 610 | 39 | 24 |
| 4 | Kyndil | 11 | 5 - 1 - 5 | 545 | 611 | -66 | 13 |
| 5 | Tjaldur | 12 | 4 - 0 - 8 | 632 | 691 | -59 | 12 |
| 6 | H71 | 11 | 0 - 2 - 9 | 644 | 715 | -71 | 8 |
| 7 | KÍF | 11 | 1 - 1 - 9 | 606 | 671 | -65 | 7 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 201 | (31) |
| Ioana Rápa | VÍF | 177 | (47) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 174 | (51) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 162 | (67) |
| Gabriella Fekete | VB | 135 | (33) |
| Regina Radó | VB | 122 | (30) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 118 | (19) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 113 | (16) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 110 | (41) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 107 | (20) |
| Alina Olaru | StÍF | 105 | (10) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 105 | (11) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 96 | (1) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 94 | (1) |
| Gunnleyg Berg | Neistin | 94 | (19) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heini Joensen | Neistin | 176 | (51) |
| Bjarni Wardum | H71 | 174 | (34) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 153 | (17) |
| Høgni Klein | Kyndil | 142 | (11) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 135 | |
| Sámal Joensen | VÍF | 134 | (24) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 134 | (39) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 129 | (17) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 125 | (12) |
| Artur Johansen | StÍF | 124 | (15) |
| Finnur Hansson | H71 | 122 | (23) |
| Durica Tomic | KÍF | 119 | (38) |
| Ingi Olsen | VÍF | 118 | (13) |
| Áki Olsen | VÍF | 114 | (12) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 110 | (20) |

# Duathlonkapping í Havn

**Um vikuskiftið skipaði Føroya Thriathlon felag fyri kapping í sonevndum duathlon**

DUATHLON
*tíðindaskriv*

Sunnudagin 16. mars skipaði Føroya Triathlon Felag (FTF) fyri fyrstu einstaklinga fleirítróttakappingini í ár. Hesaferð varð kappast í svimjing og renning.

Fyrst var svomið í Svimjihøllini, teinurin var 750 metrar. Síðani var runnið 5 km. frá Svimjihøllini, fram við Strond til Sparikassan, og aftur til Svimjihøllina.

Í kappingum sum hesari, eins og triathlon, er skiftið millum ítróttagreinirnar av alstórum týdningi, her kann ein íðkari sum einki vinna tað aftur sum hann eitt nú hevur mist í svimjingini. Ofta verða skiftini rópt gloymda ítróttagreinin.

Ikki var møguligt at fáa svimji-, skifti- og rennitíðirnar við hesaferð, men tá næsta kapping verður um miðjan apríl, verða millumtíðirnar við.

**Úrslitið hjá monnum var hetta:**

1. Bogi Lemvig tíðin: 28:47
2. Hallur Stakssund tíðin: 31:42
3. Dia Jacobsen tíðin: 33:10
4. Eli Christiansen tíðin: 33:53
5. Gunnar Dahl Olsen tíðin: 34:44
6. Evald Rasmussen tíðin: 37:42
7. Kári Simonsen tíðin: 40:09

Hóast fleira høvdu boðað frá at tær komu við, so var bara ein íðkari hjá kvinnunum.

1. Rannvá Jacobsen tíðin: 38:18

**Í grandprixnum er støðan hjá monnum hendan:**

1. Bogi Lemvig stig 40
2. Hallur Stakksund stig 34
3. Dia Jacobsen stig 30
4. Eli Christiansen stig 26
5. Gunnar Dahl Olsen stig 23
6. Evald Rasmussen stig 20
7. Kári Simonsen stig 18

**Hjá kvinnunum er grandprixstøðan hendan:**

1. Rannvá Jacobsen stig 40



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi:**
Hesir roknskapir fyri roknskaparárið 2000/01, eru innkomnir.

| | | |
|---|---|---|
| 18/4-1994 | 100 Tórshavn | Sp/f 2379 |
| 23. Oktober 1998 | 100 Tórshavn | Sp/f 2786 |
| 31. Mars 1999 | 100 Tórshavn | Sp/f 2845 |
| 3-arin | 100 Tórshavn | Sp/f 1677 |
| Á Brúgv | 800 Tvøroyri | Sp/f 1123 |
| Á Hálsi | 100 Tórshavn | P/F 2676 |
| Áarstøð | 475 Funningur | P/F 925 |
| AB-Grannskoðan | 100 Tórshavn | Sp/f 1466 |
| Ægir | 100 Tórshavn | Sp/f 1257 |
| Alistøðin á Bakka | 625 Glyvrar | P/F 2088 |
| Anadarko Faroes Co., filialur | 100 Tórshavn | 3095 |
| Andreas í Vágsbotni | 100 Tórshavn | P/F 2082 |
| Anfinnur Debess | 100 Tórshavn | Sp/f 589 |
| Argjabúðin | 160 Argir | Sp/f 1087 |
| Arkitektavirkið Árni Winther | 100 Tórshavn | Sp/f 532 |
| Atlantic Fair | 620 Runavík | Sp/f 3053 |
| Atlantic Tecnologies | 100 Tórshavn | Sp/f 3127 |
| Atlas Føroyar | 100 Tórshavn | Sp/f 229 |
| Bakkafrost | 625 Glyvrar | P/F 2089 |
| Bakstur | 100 Tórshavn | Sp/f 2036 |
| Bil- & Maskinverkstaðið | 210 Sandur | Sp/f 314 |
| Bil Sandoy | 210 Sandur | Sp/f 179 |
| Bókasølan í SMS | 100 Tórshavn | Sp/f 1846 |
| Brúgvin | 100 Tórshavn | Sp/f 3085 |
| Byggitek | 100 Tórshavn | P/F 1019 |
| Com-Data 736 | 700 Klaksvík | P/F 736 |
| DA FA | 100 Tórshavn | Sp/f 2703 |
| DB-Bilar | 100 Tórshavn | P/F 1659 |
| Demmus | 100 Tórshavn | Sp/f 391 |
| Deres, SMS, Muller & Co. | 100 Tórshavn | Sp/f 2525 |
| E. Jacobsen | 490 Strendur | Sp/f 2921 |
| E. Pihl & Søn, Føroyar | 100 Tórshavn | P/F 1478 |
| Einar Mortensen | 700 Klaksvík | Sp/f 1435 |
| El-Húsið | 600 Saltangará | Sp/f 655 |
| Eliesar Joensens Skósøla | 700 Klaksvík | Sp/f 527 |
| El-Teknik | 520 Leirvík | Sp/f 1719 |
| Esmar Simonsen | 530 Fuglafjørður | P/F 349 |
| Eyðfinnur Guðjónsson | 100 Tórshavn | Sp/f 784 |
| Eysturoyar Fysioterapi | 600 Saltangará | Sp/f 747 |
| FarIta | 440 Haldarsvík | P/F 3056 |
| Feðgar | 100 Tórshavn | Sp/f 307 |
| FGH | 100 Tórshavn | P/F 380 |
| Fjallið | 730 Norðdepil | Sp/f 2588 |
| Flogsamband F.F. | 100 Tórshavn | P/F 127 |
| Fóm | 100 Tórshavn | P/F 421 |
| Forlagið Fannir | 100 Tórshavn | Sp/f 1303 |
| Føroya Koyriskúli | 100 Tórshavn | Sp/f 1543 |
| Føroya Møblasøla | 100 Tórshavn | P/F 1814 |
| Føroya Myndasavn | 100 Tórshavn | Sp/f 577 |
| Fossáaling | 350 Vestmanna | P/F 1463 |
| Frá 11. Mai 1993 | 100 Tórshavn | Sp/f 2267 |
| frá 31/10-1979 | 100 Tórshavn | P/F 361 |
| frá 5. September 1992 | 700 Klaksvík | Sp/f 2105 |
| Funningslaks | 477 Funningsfjørður | P/F 2371 |
| Gjáar Bókhaldsvirkið | 476 Gjógv | Sp/f 1375 |
| Gjáarsmolt | 476 Gjógv | P/F 853 |
| Grannskoðaravirkið Inpact | 100 Tórshavn | P/F 289 |
| Ground Floor | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2911 |
| H.T. Holding | 100 Tórshavn | P/F 2181 |
| Hallberg | 600 Saltangará | Sp/f 600 |
| Hans Joensen á Hálsi | 100 Tórshavn | Sp/f 1529 |
| Havnar Timburhandil | 100 Tórshavn | P/F 5 |
| Hestprent | 100 Tórshavn | Sp/f 703 |
| Hjá Eli | 100 Tórshavn | P/F 1388 |
| Hógv Handilsvirki | 660 Søldarfjørður | Sp/f 2447 |
| Hornabúðin | 100 Tórshavn | Sp/f 569 |
| Hvilvtenni | 520 Leirvík | P/F 549 |
| Í Smiðjuni | 870 Fámjin | Sp/f 881 |
| Inpact | 100 Tórshavn | Sp/f 2805 |
| Ísak Thomassen Tannlækni | 100 Tórshavn | Sp/f 1818 |
| Ítrottur SMS | 100 Tórshavn | P/F 1146 |
| J. & B. Kyster | 100 Tórshavn | Sp/f 798 |
| J.F. Kjølbro Heilsøla | 700 Klaksvík | P/F 2172 |
| J.S. Holding 1986 | 100 Tórshavn | P/F 992 |
| Jall | 700 Klaksvík | Sp/f 440 |
| Jessy Bech | 950 Porkeri | Sp/f 2346 |

*Skráseting Føroya tann 15. Mars 2002*
*Kristin Balle*


**Bilur við skaða til sølu**

**Merki:** Peugeot Partner 5 Kombi 1.9
**Árg.:** 2001
**KM.:** 1.000

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
Tlf.: 345728
Fax: 345607
e-mail: mpe@trygging.fo

at hitta mánadag – hósdag kl. 08.30–10.00
og fríggjadag kl. 08.30–16.00.

**Rio Bravo**

**Søkt verður eftir servitrisum at byrja skjótast gjørligt. Løn eftir avtalu**

RIO BRAVO
Tlf 319767
RESTAURANT





Tann rætti klædningurin fæst hjá okkum. Hann er sera slitsterkur, viðlíkahaldsfríur, og hann er á goymslu.

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



**Entreprenørútgerð, Maskinur & Eykalutir**





- Nýggjar & brúktar gravimaskinur og kompressarir
- Boriútgerð, spreingimáttur, skerimaskinur, plátuvibratorar, trumlur, blandimaskinur, tvangsblandarir, gummibeltir og dekk til flest allar entreprenørmaskinur

Umframt mangt annað!

Sosialurin - 311820

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

i
Sosialurin

**Páskaútsølan hjá Berg Motors heldur fram**

Vit hava ein hóp av frásorteraðum bilum, ið verða seldir fyri væl niðurtrampaðar prísir

**Mazda B2500 RegCab stál DX**, v/ smáskaða grønur, 142.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 112.700,-
**Mazda B2500 PlusCab stál DX,** v/ smáskaða reyður, 154.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 124.700,-
**Mazda E2200 Glasvan DX,** v/ smáskaða bláur, 159.700,-, avlsáttur 25.000,- Tilboð 134.700,-
**Mazda 323 4SDN 1,6i Touring,** v/ smáskaða svartur, 188.700,-, avsláttur 34.000,- Tilboð 154.700,-
**Mazda 323 5HB 1,6i Touring,** v/ smáskaða gráur, 196.700,-, avsláttur 34.000,- Tilboð 162.700,-
**Mazda Premacy 5HB 1,8i LX,** uppruddíng gull, 178.700,-, avsláttur 13.000,- Tilboð 165.700,-
**Mazda Premacy 5HB 1,8i GLX,** demo-bilur bláur, 190.700,-, avsláttur 20.000,- Tilboð 170.700,-
**Mazda Premacy 5HB 2,0DiTD LX,** v/ smáskaða grønur, 218.700,-, avlsáttur 25.000,- Tilboð 193.700,-
**Mazda Premacy 5HB 2,0DiTD LX,**v/ smáskaða bláur, 218.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 188.700,-
**Mazda 626 4SDN 1,8i 100 HK Comfort,** upprudding grønur, 192.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 162.700,-
**Mazda 626 4SDN 1,8i Comfort,** upprudding grønur 192.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 162.700,-
**Mazda 626 4SDN 2,0i 115 HK Exclusive,**upprudding grønur, 201.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 171.700,-
**Mazda 626 4SDN 2,0i 115 HK Exclusive,** upprudding beige, 201.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 171.700,-
**Mazda 626 4SDN 2,0i 115 HK Exclusive,** upprudding gráur, 201.700,-, avsláttur 30.000,- Tilboð 171.700,-

Ein rúgva av brúktum bilum verða eisini seldir bíliga

BERG MOTORS
Staravegur 1-3
Tel. 31 35 35
Fax 31 77 35